# Vinnarnir funnir í borðtennis

**Nú eru vinnararnir í teimum ymsu Grand Prix kappingunum í borðtennis funnir**

BORÐTENNIS
*Tíðindaskriv*

Fimta og seinasta umfar í árligu Grand Prix kappingini í borðtennis varð avgreitt í Havn um vikuskiftið.

Um 80 leikarar í 11 deildum kappaðust allan leygardagin í Eysturskúlanum.

Spenningurin var í hásæti í høllini, har foreldur og kenningar vóru møtt at stuðla sínum nærmastu. Klokkan var næstan eitt, áðrenn teir fyrstu fimm bólkarnir vóru lidnir, men enn kundi samlaða støðan ikki teljast upp, tí fyrst máttu teir síðstu seks bólkarnar eisini avgreiðast. Um fýra tíðina var so klárt at gera støðuna upp og vóru tá fleiri stórar broytingar í samlaðu støðuni.



*Annika Mikkjalsdóttir vann kappingina hjá smápinkum*



*Marin Brattalíð var best hjá pinkum*



*Hans Jón Jacobsen vann hjá smápiltum*

## Tey yngstu

Hjá smápinkunum og smápiltunum gjørdist eingin broyting eftir 5. umfar, har ávíkavist Anna Mikkjalsdóttur og Hans Jón Jacobsen bæði úr TBF vunnu.

Har afturímóti gjørdist meira spenningur í pinku- og piltadeildini. Hjá pinkunum kappaðust tvøragenturnar Marin Brattalíð og Birita Mortensen um 1. plássið og gjørdist endin tann, at Marin vann við 12 stigum meira enn Birtia. Nr. 3 gjørdist Sára Hentze eisini úr TBF.

Hjá piltunum var undan seinasta umfarið avgreitt at Rasmus Potts og Heini Mortensen gjørdist ávíkavist nr. 1 og 2, meðan meira spenningur var um hvør skuldi gerast nr. 3. Eftir 4. umfar var Mattias Mortensen á 3. plássið, 10 stig framman fyri Patrikk Johannesen, men eftir at Patrikk endaði trý pláss frammanfyri Mattias í dagsins umfari, so fekk Patrikk bronsu við sínum samlaðu 610 stigum, meðan Mattias fekk 600 og endaði tí á einum 4. plássi.

## Spennandi endi

Í smádreingjadeildini vóru tríggir teir fremstu longu funnir, men serligur spenningur var enn um, hvør í skuldi endað á 1. plássið. Gilli Sørensen og Fróði Jensen úr TBF kundi báðir undan hesum umfarinum vinna gull, men treytin fyri Gill var, at hann endaði átta pláss framman fyri Fróða í dagsins umfarið. Hetta mundi eydnast honum, men gjørdist tó akkurát tvey pláss ov stuttur og tí mátti hann taka til takkar við silvurinum, meðan Fróði fekk gull og Hugin Albinus bronsu.

Hjá smágentunum var spenningurin ikki tann stóri, tí um Rakul Mikkjlasdóttur skuldi hava nakran sum helst møguleika at vinna deildina, so skuldi hon hava 70 stig fleiri enn Sheila Strøm í dag. Hetta vildi Sheila tó øðrvísi og megnaði hon at halda ein avstand uppá bert 10 stig. Tískil gjørdist Sheila vinnari hjá smágentunum við 1200 stigum, meðan Rakul fekk silvur við 1110 stigum.

## Avgerðin var fallin

Í gentu- og dreingjadeildini vóru næstan allar plaseringarnar avgreiddar áðrenn 5. umfar og tí var ikki tann stóri spenningurin har. Tó kundu bæði Hallur Thorsteinsson úr Tór og Sjúrður Ferjá úr TBF røkka einum 3. plássi í dreingjadeildini. Men av tí at Hallur fekk eitt 2. pláss í dag, so streyk hann avstað við bronsuni, við at fara 20 stig frammum Sjúrð í samlaðu kappingini. Hjá Gentunum endaði Susi Midjord nr. 1, Joan Thomasen nr. 2 og Svanna Mortensen nr. 3.

Í meistaradeildini var heldur ikki tann heilt stóri spenningurin í, men tó hevði Fríði Jensen úr TBF, enn ein teoretiskan møguleika at stjala gullið frá Peturi Niclasen úr Tór. Um so var at Fríði skuldi gera sær nakra vón um at vinna samlaðu Grand Prix kappingina í ár, so skuldi hann vinna kappingina í dag, meðan Petur skuldi enda á einum 4. plássið. Men hetta var næstan óhugsandi, eftir at Petur í ár hevur vunnið heili trý av fýra umførum, sum hann hevur luttikið í. Og so var, Petur vann enn eitt umfar, meðan Fríði bert bleiv nr. tvey og tískil rakk hetta bert til eitt silvurheiðursmerki. Bronsu fekk Vagnur Nolsøe úr TBF.

## Uttanlands at kappast

Eftir kappingina vóru steyp latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjari deild og vóru hesi eisini boðin til Danmarkar at luttaka í Brøndby Cup, sum verður í døgunum 18. og 19. mars. BTSF hevur gjørtav á hvørjum ári at senda trý tey fremstu í Grand Prix kappingini at luttaka í altjóða kapping uttanlands. Hetta verður mett at verða ein eyka gularót til leikararnar, og vónar BTSF at síggja enn størri kapping um heiðursmerkjaplássini í Grand Prix kappingini til komandi ár.

Næsta kappingin, ið BTSF skipar fyri er FM fyri yngri deildir, sum verður í ítróttarhøllini í Trongisvági 24. og 25. mars.

## FAKTA

**Endaliga støðan í Grand Prix kappingini í borðtennis 2005/2006**

**Smápinkur**
Anna Mikkjalsdóttur, TBF - 330 stig
Durita Jensen, TBF - 270 stig
Lív Øster, TBF - 264 stig

**Smápiltar**
Hans Jón Jacobsen, TBF - 330 stig
Eyðfinnur Jensen, Royn - 286 stig
David Mortensen, TBF - 230 stig

**Pinkur**
Marin Brattalíð, TBF - 364 stig
Birita Mortensen, TBF - 348 Stig
Sára Hentze, TBF - 294 Stig

**Piltar**
Rasmus Potts, TBF - 920 stig
Heini Mortensen, TBF - 750 stig
Patrikk Johannesen, TBF - 610 stig

**Smágentur**
Sheila Strøm, TBF - 1200 stig
Rakul Mikkjalsdóttur, TBF - 1110 stig

**Smádreingir**
Fróði Jensen, TBF - 1520 stig
Gilli Sørensen, TBF - 1510 stig
Hugin Albinus, TBF - 1310 stig

**Gentur**
Susie Midjord, TBF - 1310 stig
Joan Thomasen, TBF - 910 stig
Svanna Mortensen, TBF - 568 stig

**Dreingir**
Reidar Luid, Tór - 1820 stig
Pætur Albinus, Tór - 1600 stig
Hallur Thorsteinsson, Tór - 1440 stig

**Kvinnuunglingar**
Marin í Dali, TBF - 1560 stig
Mariann Mikkjalsdóttur, TBF - 1090 stig

**Mansunglingar**
Ragnar Egilsson, Tór - 1850 stig
Sigurð Carlsson, Tór - 1650 stig
Levi Winther, Tór - 990 stig

**Meistaradeildin**
Petur Niclasen, Tór - 1970 stig
Fríði Jensen, TBF - 1890 stig
Vagnur Nolsøe, TBF - 1580 stig